Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)

(Lækka inngjaldið til Vinnusjúkugrunnin og víðka virkisøkið hjá Vinnusjúkugrunninum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 48. frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 108 frá 10. oktober 2023 og løgtingslóg nr. 40 frá 25. mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 78, stk. 1, verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Vinnusjúkugrunnurin virkar somuleiðis fyri upplýsing um vinnusjúkur og fyribyrging av vinnusjúkum."

2. Í § 78, stk. 4, verða 2. og 3. pkt. orðað soleiðis:
"Inntøkur grunsins skulu nýtast til endurgjald fyri vinnusjúkur, sum eru fráboðaðar í árinum, útreiðslur til umsiting, heruppií kostnað til Vanlukkutryggingarráðið, virksemi, sum hevur til endamáls at upplýsa um og fyribyrgja vinnusjúkum, og til avsetingar til tiltakspeningin."

3. Í § 79, stk. 2 og 3, verður "0,10%" broytt til: "0,05%".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Samtykt á Løgtingi hin 9. desember 2025 við 30-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 9. desember 2025

stjóri

LM-023/2025